# TÚ RENNA Á LAND





*Nemus á heimavølli – í sínum stóli í stovuni heima*

**FAKTA NEMUS N. DJURHUUS**

**Aldur:** 54 ár
**Starv:** Dagligur leiðari í Mimir
**Familja:** Giftur við Rúnu Mortensen. Tey eiga fýra synir og eina dóttir
**Bústaður:** Tórshavn

MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG

Barrvørðar hitta fólk í øllum aldri, í góðum og minni góðum lagi, við ymiskum promillum og við fjølbroyttum meiningum og tankum. Og tað hevur ongantíð verið nakað, sum hevur forskrekt Nemus.

– Sum barrvørður kemur tú at kenna menniskjað og menniskjalyndið. Tú sært, hvussu fólk reagera í ymiskum støðum, og tolir mann ikki menniskju, so skal mann halda seg burtur frá at verða barrvørður.

Summi fólk vilja snakka, men tann klassiska søgan við, at »kona mín skilir meg ikki« er ikki til. Tað er sjáldan, at fólk tosa persónligt við barrvørðin.

## Tímir ikki at angra

Nemus er ein býarmynd í Havn, og honum dámar væl at verða millum lívlig fólk. Men tað eru eisini løtur, har hann bara vil hava frið – í egnari verð við stongdari hurð.

– Tað er gott at fáa ein tíma ella hálvan annan fyri seg sjálvan hvønn dag. Eg havi arbeitt nógv um kvøldarnar, so um dagin, tá ið eg havi verið einsamallur heima, havi eg sett meg í stólin hjá mær og slappa av. Stongt hurðina, verið fyri meg sjálvan, kanska lurta eftir tónleiki og givið mær góða tíð til at lesa bløðini. Uttan hesar løturnar hvønn dag hevði tað tað als ikki borið til.

Nemus hevur upplivað mangt og hvat í sínum lívi, men hann hugsar ikki nógv um tað, sum hann kanska ikki hevur upplivað ella angrar í sínum lívi.

– Tá mann skal sita og hugsa, hvat mann angrar við lívinum, so kann tað ikki verða heilt galið.

Eg havi lættari við at hugsa um tað góða, sum eg havi upplivað. Ferðir, famija, børn og annað. Eg havi grenjað fyri meg, men nú sigi eg bara »Nemus, ikki grenja, góði!«

– Fyri nøkrum árum síðani hugsaði eg, at eg hevði viljað royndt at arbeitt í Danmark sum handverkari, og tað gjørdi eg í eina tíð. Tað var langt úti á bølandinum, og eg hevði einar 20 kilometrar til nærmastu barr, sigur hann flennandi.

– Eg tími ikki at brúka tíð upp á at hugsa um, hvat eg kundi gjørt øðrvísi ella ikki gjørt.

Men hvørjar eginleikar hjá fólki dámar Nemus?

– Eg gangi høgt upp í, at ein maður er ein maður. Gert tú eina avtalu við fólk, heldur tú hana. Og gert tú eina tænastu fyri onkran, er tað vert eina tænastu afturfyri.

- Mær dámar ikki fólk, sum ganga runt við slatri aftanfyri ryggin á tær. Mann skal heldur kalla ein spaka fyri ein spaka – tað er nógv betri, sigur hann.

*– Tá mann skal sita og hugsa, hvat mann angrar við lívinum, so kann tað ikki verða heilt galið. Eg havi lættari við at hugsa um tað góða, sum eg havi upplivað. Ferðir, famija, børn og annað. Eg havi grenjað fyri meg, men nú sigi eg bara »Nemus, ikki grenja, góði!«*

» Ein vandi við at selja rúsdrekka til fólk er, at tey blíva full.